## Færri á miðnám, fleiri í læru

Í ár hava 1.032 søkt inn á miðnám. Hetta eru 93 færri umsøkjarar enn í fjør, ið er ein minking á 8 prosent. Eins og undanfarin ár eru fleiri gentur enn dreingir, ið søkja inn á miðnám.

Síðan 2015 er talið á umsøkjarum minkað við til samans 186, hetta svarar til eina minking á 15 prosent.




Í ár rakar minkingin serliga tær gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, ið lækka 11 prosent, meðan tær vinnurættaðu miðnámsútbúgvingarnar lækka 7,5 prosent.




Meðan gongdin á miðnámi hevur verið minkandi, er talið av lærusáttmálum hækkað við 82 í tíðarskeiðnum 2015-2017. Hetta svarar til ein vøkstur á 29 prosent.




Farið verður nú undir at viðgera umsóknirnar, og umsøkjarar fáa svar hósdagin 19. apríl.